# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 30.05.2016 kl. 17.30

Á fundi: Trúgvi Gudmundarson
Rúni Thomsen
Eyðfinn Debes
Magni Bertholdsen
Martin í Nesi
Niels J. Thomsen

Ikki møtt: Jóhan Eli Poulsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka mál nr. 8 fyrst - hetta varð játtað.

1. **Val av 2 umboðum í nevndina fyri Hvalbiar Sóknar fornminna- og kolasavn.**
   Í nevndina fyri Hvalbiar Sóknar fornminna- og kolasavn eru valdir: Manne Næs, formaður, Poul J. Jespersen, peningarøkil og Símun Berg, skrivari. Sambært viðtøkunum skal Hvalbiar Kommuna velja 2 umboð í nevndina. Samtykt varð at velja Vónbjørt á Hólum og Anna-Britt Norðberg Eið sum umboð fyri kommununa.

2. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Føroyingafelagnum í Aalborg.**
   Søkt verður um stuðul til at betra um og menna virksemið í felagnum. Samtykt varð einmælt ikki at stuðla hesum.

3. **Umsókn um stuðul til 100 ára hátíðarhald fyri kvinnuvalrætti frá Demokratia.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla tiltakinum.

4. **Umsókn um stuðul til námsferð frá 2. x á Miðnámsskúlanum í Hovi.**
   Søkt verður um stuðul í sambandi við námsferð til Grikkalands í oktober. Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 1.000,- ella kr. 500,- pr. næming, ið er tann upphædd, ið kommunan vanliga stuðlar við.

5. **Umsókn um stuðul til Fótbóltsskúlan 2016 hjá Ungdómsdeildini hjá TB.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla hesum við kr. 2.000,-.

**6. Umsókn um fíggjarligan stuðul til ferð frá Eiðis Ljómfelag.**

Í sambandi við ferð til Gotlands seinni í summar, verður søkt um stuðul til endamálið. Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

**7. Skriv frá Rúna Thomsen um ruddingardag í Hvalbiar Sókn.**

Skotið verður upp at hava ruddingardag í sóknini leygardagin tann 11. juni, har byrjað verður við morgunmati í Roynhøllini og Ranhøll og síðani verða bygdirnar býttar upp í øki, har fólk fer at rudda. Samtykt varð einmælt at hava ruddingardag tann 4. juni ístaðin og at børnini rudda mánadagin tann 6. juni.

**8. Skriv frá Mentamálaráðnum viðv. Musikkskúlanum í Suðuroy.**

Samtykt varð at vísa til samtyktina frá 21.03.2016, har Hvalbiar Kommuna heitti á nevndina fyri Suðuroyar Musikkskúla um at halda seg til niðurstøðuna frá Løgtingsins umboðsmanni um at hava setanarsamrøður við umsøkjarar, tá størv hava verið lýst leys og síðani innstilla til bý- og bygdarráðini, ið hava setanarmyndugleikan.

**9. Ársroknskapur 2015 til góðkenningar.**

Ársroknskapur hjá Hvalbiar Sóknar Kommunu fyri 2015 til góðkenningar. Fíggjarnevndin hevur gjøgnumgingið roknskapin og mælir bygdarráðnum til at góðkenna hann. Inntøkurnar eru t.kr. 29.192, rakstrarútreiðslur t.kr. 23.925 og løguútreiðslur t.kr. 2.891. Roknskapurin gevur eitt av-lop á t.kr. 2.375. Meirinntøkur av skatti í sambandi við eldraøkið er t.kr. 7.065 og leiguinntøka av sambýlinum t.kr. 362 – útreiðslurnar til eldrasamstarvið eru t.kr. 7.706. Samtykt varð ein-mælt at góðkenna roknskapin.

**10. Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd:**

- Umsókn um byggiloyvi til hús á matr. nr. 219a.
- Umsóknir um boriloyvi til jarðhita á matr. nr. 524f og matr. nr. 25f. Umsóknirnar eru sendar Jarðfeingi/Umhvørvisstovuni til viðmælis.
- Skriv frá Vatnsýnisnevndini í sambandi við vatntrupulleikar í Mýrunum.

**11. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd (framløga Magni Bertholdsen):**

- Byggiloyvi til hús/smáttu matr. nr. 219a: Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og viðløgdum tekningum.
- Vatntrupulleikar í Mýrunum: Samtykt varð at boða eigarunum frá, at sambært Vatnsýnis-nevndini hevur kommunan onki við málið at gera.

**Vega- og havnanevnd (framløga Eyðfinn Debes):**

- Órudd á havnalagnum í Nesi: Hetta mál varð viðgjørt á bygdarráðsfundi tann 25.01.2016, har niðurstøðan viðv. trolreiðskapinum var, at havnaumsjónarmaðurin skuldi kanna, um hesin skuldi brúkast aftur. Um ikki, skuldu stig takast til at beina hetta burtur. Samtykt varð at kanna møguleikan at leggja reiðskapin aðrastaðni.

**Trivnaðarnevnd (framløga Rúni Thomsen):**

- Tilboð uppá teldur 2 nýggjar teldur: Tilboð eru komin frá Nema og Aktiv uppá farteldur og stationerar teldur. Stationer frá Nema kr. 7.786,00 og frá Aktiv kr. 5.598,00 – fartelda frá Nema kr. 11.051,00 og frá Aktiv kr. 7.468,00. Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum uppá farteldur frá Aktiv.
- Skriv viðv. Dímunarhellinum: Kunnað varð um, at í sambandi við, at Dímunarhellið skal setast upp í Roynhøllini til Drotningavitjanina, er ætlanin, at listamaðurin Bernard Hammer kemur at prýða hetta.
- Túná-kort: Kostnaðurin fyri kortið er kr. 175,00. Samtykt varð at keypa 40 stk. til næmingarnar í teimum yngstu flokkunum í skúlanum.
- Dagrøktin – keyp av leikutoyi: Samtykt varð at játta kr. 15.000,- til keyp av leikutoyi.

Ikki almenn mál:

**12. Fíggjarnevndin (framløga Trúgvi Gudmundarson):**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.45

| | | |
|---|---|---|
| Trúgvi Gudmundarson | Rúni Thomsen | Eyðfinn Debes |
| Magni Bertholdsen | Martin í Nesi | Niels Jacob Thomsen |